# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Lena Maria Danielsen 60 ár

Hósdagin 24. september fyllir Lenemi 60 ár. Lenemi býr Norðuri í Sundum í Kollafirði og er uppvaksin í Klaksvík. Hon er dóttir Emly og Julian Poulsen.

Lenemi er elst av sjey systrum, hevur altíð verið sín egin, góð og holl í ráðum, og hava vit mangan notið gott av tí.

Lenemi er gift við Arna Danielsen, ættaður uttan úr Grøv í Klaksvík. Tey eiga trý børn og tríggjar ommudøtur.

Lenemi hevur arbeitt á skrivstovuni hjá Kemilux síðan 1986 og varð fyrr í ár sett sum figgjarleiðari.

Føðingardagurin verður hildin heima við hús hóskvøldið, og vóna vit, at hon far ein góðan dag.

**Heilsan**
**Mamma og systrar**

### Minningarorð

## Andrias Eliesar Nolsøe

**★. 5. sept. 1950 – ✞. 11. sept. 2009**



*Nú heystsólin bliknar*
*kom sorgin í garð*
*lívskøvandi kalda hondin teg nam*
*í ævisvøvnin svann hin seinasti neisti*

*Meg minnist teg, lívsglaðan unglinga*
*ágrýtin, trúfastur og treystur*
*avhildin, knappur og kvikur á leikvølli*
*framsøkin, men tó lítillátin og spakførur*
*jaligur fram um alt*

*Tú setti hjálpsemi og arbeiðssemi høgt*
*var við til úr náttúrunnar tilfeingi*
*at skapa fjálg og dygdargóð heim kring alt landið*
*ein siðbundin og nútímans virkin maður*

*Tín kærleiki og umsorgan*
*títt blíðni og mildni*
*fyri tínum kæru, tínum dýrgripum*
*ansin fyri smálutum barnanna*
*fatan av teirra leiki og lyndi*
*alskin til náttúruna*
*setti tú fram um alt*

*Ein góðan vin, eina holla fyrimynd*
*ein pápa og mann og frænda*
*vit minnast við størsta takksemi og størstu virðing*
*og vit drýpa høvur í samkenslu*

*Tøkk, at eg átti teg sum vin*

Harrin signi minni um Andrias

**Vinur tín Johan**

Góða Hanna, Jón Eli og Annika og øll tykkara orð eru so fátæk, men má hin Almáttugi styrkja tykkum í stóru sorg tykkara.

*Undir tínum veingjabreiði*
*eg í hjartatempli eigi*
*kærleika á lívsins leið,*
*trúgv og reinleika og megi,*
*at eg hvíla kann við gleði,*
*tá ið runnið er mítt skeið.*

### Prógv



Alberta Mc. Leod Jacobsen, Klaksvík, hevur 20. august fingið prógv sum kanditat í Psykologi á Aalborg Universitet.

### Dagurin

21. september. Ápostulin og evangelisturin Matteus. Halgisøgan veit at siga, at tá ið ápostlarnir skiltust, fór Matteus til Etiopia og boðaði evangeliið har. Er helst ein av teimum, sum á kirkjubøstólunum er avmyndaður við bók í hendi. Kongurin í Etiopia læt hann taka av døgum. Bíbilska navnið merkir Guds gáva.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá okkara kæra móðir, vermóðir, omma og langomma

**Poulina Ravnsfjall**
Miðvágur

doyði og varð jarðað.

Tøkk til starvsfólkið á Sýnini, prest, kirkjutænarar og sangarar, og til øll tykkum, ið hjálptu til og fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Børnini við familju**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið okkara elskaða mamma, vermamma, omma og systir

**Lotta Vest Joensen**
Vágur

doyði og varð jarðað.

Tøkk til starvsfólkini á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi og á Suðuroyar Sjúkrahúsi.
Tøkk fyri peningagávur til Vágs Kirkju.
Tøkk til tey mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Julius, Durita & Jóna**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara elskaði pápi, verpápi og abbi

**Erland Stenberg**
Vágur

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til prest, dekn, sangarar, berarar, gravarar og klokkara.
Tøkk til Jonhild fyri tann vakra sang í kirkjuni.
Tøkk til starvsfólkið í Suðuroyar Sjúkrahúsi, sum vóru so góð við hann og vóru um hann.
Tøkk øll tit, sum hjálptu til og fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað
Hjartans tøkk øll somul.

**Jónfríð**

